tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 111 Hósdagur 15. juni 1995 | 69. árgangur | Krónur 7,00



*Føroyskur fiskifrøðingur um Brent Spar:*

# Kann skaða lívið á Rosemary banka

Hjarnar Djurhuus, Shellstjóri: »Greenpeace hevur blást málið upp«

Um seinastu dagarnar hjá oljupallinum Brent Spar á síðunum 8-9

**BO WALLENBERG:**

## Neyðin í Ukraina er endaleys

síðurnar 10 & 11



Fimtan manaðar gamla Ira er eitt av teimum mongu børnunum í Ukraina, ið hevur fingið hjálp gjøgnum Skandinavisku Barnamissiónina



Bretski samráðingarleiðarin, David Anderson og Árni Olafsson á veg av samráðingunum. Mynd: Jan Muller

*Løgmaður um samráðingarnar um undirgrundina:*

# Nú mugu vit gera okkum greitt hvat vit vilja víðari

síða 12

*Jákup Reinert, fiskifrøðingur:*

# Vandi fyri dálking av fiski

*Brent Spar kann skaða umhvørvið við Rosemary banka, um hann verður sleptur í dýpið.*

Nakað vestan fyri Rosemary banka beint sunnan fyri føroyska fiskimarkið hevur Shell ætlanir um at søkkja Brent Spar.

Verður boripallurin sleptur í dýpið, kann tað fáa skaðiliga ávirkan á økið, har hann fer at liggja.

Tað sigur Jákup Reinert, fiskifrøðingur, á Fiskirannsóknarstovuni.

Fiskur hevur tað fyri at koma sær nær øllum, sum liggur á botni, og um boripallurin verður søktur, kann tað skaða lívið, har hann kemur niður, sigur Jákup Reinert.

Hann væntar ikki, at skaðiliga árinið innan fyri okkara mark verður so stórt, um Brent Spar fer at liggja á 2.000 metra dýpi, sum nevnt hevur verið, tí so djúpt eru ongir streymar, sum ganga ímóti Føroyum.

Men var talan um 500 metra dýpi, so hevði vandin verið størri, og tá kundi talan verið um beinleiðis árin á føroyskt sjóøki, sigur Jákup Reinert.

**Sami fiskur**

Føroysk fiskifør hava ikki beinleiðis atgongd til økið við Rosemary banka, tí tað er ES-sjógvur.

Serliga fraklendingar royna nógv har eftir blálongu, stinglaksi og langasporli, og somu fiskasløg fiska føroysk fiskifør á djúpum vatni innan fyri føroyska markið.

Jákup Reinert heldur, at prinsipielt er tað forkastiligt, at Shell nú ætlar at søkkja ein av sínum gomlu boripallum.

Her er talan um eitt øki, sum verður gagnnýtt til matna, og tí skuldi loyvið til søkkingina ongantíð verið givið, sigur Jákup Reinert.

uni




*Rosemary banki, har Shell ætlar at søkkja boripallin Brent Spar, liggur beint sunnanfyri føroyska fiskimarkið. Føroyskir línubátar hava sett á hesum leiðum fyrr, og fraklendingar royna nógv har nú. Pílurin vísir, hvar á leið ætlanin er at søkkja Brent Spar*

*Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum:*

# Ongi verjuskip fara eftir boripallinum

*Landsstýrið bíðar eftir upplýsingum um Brent Spar, og tá tær koma, verður møguliga eitt skrivligt mótmæli sent bretsku stjórnini*



Tað fer ikki at koma upp á tal, at landsstýrið sendir verjuskip eftir Brent Spar, tí tað er ikki vanligt, at føroyingar mótmæla á tílíkan hátt.

Hetta sigur Eilif Samuelsen, landsstýrismaður í umhvørvismálum, nú løtan fer at koma, at Shell - um Greenpeace ikki forðar tí - søkkir boripallin við Rosemary banka sunnan fyri markið.

Landsstýrismaðurin bíðar í løtuni eftir nærri upplýsingum um Brent Spar, sum skulu koma úr umhvørvismálaráðnum.

Landsstýrið vil hava at vita frá Svend Auken, umhvørvismálaráðharra, hvar akkurat boripallurin skal søkkjast, og hvussu vandamikil evnini eru, sum eru umborð.

Tá upplýsingarnar fyriliggja, fer landsstýrið at taka støðu til, um skriv skal sendast beinleiðis til bretsku stjórnina at boða frá, at føroyingar finna seg ikki í, at Shell søkkir Brent Spar so nær føroyska fiskimarkinum.

Landsstýrið hevur í skrivinum til umhvørvismálaráðharran gjørt vart við áhugan hjá føroyingum at halda umhvørvið kring Føroyar reint.

Vit hava sagt, at okkum dámar illa, at Brent Spar verður søktur so tætt hjá okkum, og vit hava tí biðið Svend Auken tala okkara søk, tá hann úttalar seg um málið, sigur Eilif Samuelsen.

Landsstýrismaðurin sigur, at sama um eiturevni eru umborð á Brent Spar, so er hetta ikki rætt mannagongd, Shell brúkar.

Slík søkking kann vera byrjanin til fleiri tílíkar søkkingar, og tað er stak óheppið fyri okkum, sum liggja so nær, heldur landsstýrismaðurin.

uni

Situr tú við barninum í fanginum ?

Visti tu av, at í brasteðgi úr 50 km/t er rørslumegin hjá barni, ið vigar 20 kg, 2 tons

Bilbelti er lívbelti !

